# Jagland formaður



Fyrrverandi norski forsætisráðharrin og stórtingsformaðurin Thorbjørn Jagland varð í gjár valdur til formann í Evroparáðnum. Valstríðið upp undir formansvalið hevur vart eitt ár, og hesa tíðina hevur Thorbjørn Jagland vitjað umleið 40 av teimum 47 limalondunum í Evroparáðnum. Tá atkvøtt varð í gjár, fekk Jagland 165 atkvøður, og kappingarneytin, Wlodzimierz Cimoszewicz úr Póllandi, fekk 80. Aftan á atkvøðugreiðsluna segði tann nývaldi formaðurin, at hann fer at virkan fyri ymsum nýskipanum í ráðnum, sum eftir hansara tykki er vorðið ov líkt einum skrivstovuveldi.



*- Ætlanin hjá okkum er at keypa og arbeiða nógvan fisk, og tað er eisini neyðugt, um møguleikarnir hjá virkinum skulu troytast til fulnar, samstundis sum hetta kemur at skapa nógv virksemi aftur í Klaksvík, sigur Hanus Hansen, stjóri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

leiðslum. Men tað vil altíð vera soleiðis, at nøkur fiskasløg og nakrar framleiðslur loysa seg betri enn aðrar, sigur Hanus.

### Ljós framtíð

- Hetta er veldugt, og hetta tími eg ordiliga væl. Eg eri ógvuliga spentur upp á at sleppa í gongd og eri sera fegin um, at vit í einum góðum samtaki nú kunnu reisa virksemið á Kósini á føtur aftur. Eg vildi ynskt, at vit kundu sloppið í gongd beinanvegin, men neyðugt er fyrst, at aðalfundur verður hildin í felagnum.

Hanus sigur seg vóna, at virksemið á Kósavirkinum kann takast uppaftur um einar 2-3 vikur.

Spurdur, hvussu hann metir útlitini vera fyri, at roynd fólk aftur eru tøk til framleiðsluna, nú fiskaarbeiði hevur ligið stilt tað mesta av einum ári, sigur hann:

- Jú, sjálvandi vóni eg, at fleiri av teimum, sum vóru álitið á virkinum, koma aftur. Hinvegin er hugsandi, at tey, sum eru farin í vinnu aðrastaðni, trívast, har tey eru. Nú fáa vit at síggja, hvussu verður, men eg ætli mær í øllum førum, at tey, sum koma at arbeiða á Kósavirkinum, tá virksemið kemur í gongd aftur, skulu hava eitt gott og trygt arbeiðspláss við lønandi vinnu. Tað er í øllum førum okkara mál, og tað vóni eg, at vit megna at halda.

Umframt at Kósin eins og onnur virki verður við í kappingini um fiskin á uppboðssøluni, liggur eisini í endurreisnini av virkseminum, at tvey pør burtur av koma at leggja veiðina upp til Kósavirkið. Hetta eru skipini, Nónhamar, Fjalshamar, Safir og Smargd, sum felagið hjá Kristian Martin Rasmussen keypti frá Føroya Banka fyrr í ár.

### Ríkiliga dýr

Hanus Hansen sigur, at samtakið, sum stendur aftan fyri keypið av Kósavirkinum, letur einar 18 miljónir krónur fyri virkið.

Sjálvur heldur hann, at hetta er ríkiligt, sum hann tekur til, men hetta er tað, sum partarnir eru komnir ásamt um.

Seinastu árini hava Jóhan Páll Joensen og aðrir átt og rikið fiskavirkið á Kósini, men teir hava skula forrentað eina nógv størri skuld, enn nýggju eigararnir koma at gera.

Við søluni hevur Føroya Banki mist einar 12 miljónir krónur, eins og Norðoya Sparikassi áður hevur mist eitt miljónatal, sum er enn størri.

Soleiðis mugu vit rokna við, at tað, sum nýggju eigararnir skulu forrenta við keypinum av Kósavirkinum, er út við 30 miljónir krónur minni enn tað, sum gomlu eigararnir sótu við.

- Ætlanin hjá okkum er at keypa og arbeiða nógvan fisk, og tað er eisini neyðugt, um møguleikarnir hjá virkinum skulu troytast til fulnar, samstundis sum hetta kemur at skapa nógv virksemi aftur í Klaksvík, sigur Hanus Hansen, sum var í góðum hýri, tá vit hittu hann í telefonini í morgun.

# Loysnin bíðar eftir Fiskimálaráðnum

**Tummas Christhopersen, reiðari í Vestmanna, bíðar nú eftir svari úr Fiskimálaráðnum um loyvi at flyta fiskidagarnar, sum ísfiskatrolararnir Nornagestur og Kolumbus eiga, yvir á Nónhamar og Fjalshamar, sum avtala er gjørd um at keypa frá Kristian Martin Rasmussen og synum. Ætlandi skulu hesi bæði skipini saman við Safir og Smaragd, sum eisini eru við í keypsavaluni, verða partur av ráfiskagrundarlagnum undir Kósavirkinum**

KÓSAVIRKIÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ikki einki samstarv millum JFK-samtakið í Klaksvík, sum Hanus Hansen stendur aftanfyri og Tummas Christhopersen, reiðara í Vestmanna.

JFK-samtakið eigur 10% í Miðalsbrekku í Vestmanna, sum eigur partrolararnar Vestmenning og Fram. Hini 90% eigur Tummas Christhophersen sjálvur.

### Keypsavtala

Fyrr í ár keyptu Kristian Martin Rasmussen og synir teir fýra trolararnar, Safir, Smaragd, Nónhamar og Fjalshamar frá Føroya Banka.

Men hesi skipini áttu bara stívliga 400 fiskidagar tilsamans, og tað er ov lítið til øll skipini.

Tá Føroya Banki seldi Navaran og Borgaran til Hvalbiar, fylgdu fleiri fiskidagar við, enn skipini frammanundan áttu. Tí varð so lítið eftir til tey fýra skipini, ið bankin tá framvegis átti og seinni seldi Kristian Martini.

Sum part av endurreisnini av Kósini, hevur reiðarin í Vestmanna, sum saman við Dánjali Jacobsen eigur løgdu partrolararnar, Nornagest og Kolumbus, gjørt avtalu við Kristian Martin Rasmussen og synir um keyp av øllum fýra skipinum, Safis, Smaragd, Nónhamri og Fjalshamri.

Tað er P/F Vár í Vestmanna, sum eigur Nornagest og Kolumbus, og her eiga Tummas og Dánjal hvør síni 50%.

Avtalan, sum gjørd er við felagið í Klaksvík um keyp av teimum fýra skipunum, er tó treytað av, at dagarnir hjá Nornagesti og Kolumbussi kunnu flytast yvir á Nónhamar og Fjalshamar, sum síðan – og saman við Safir og Smaragd – ætlandi skulu leggja veiðina upp til Kósavirkið, tá tað kemur í gongd aftur.

### Bíða eftir svari

Tummas Christhophersen, reiðari, sigur, at teir framvegis bíða eftir svari úr Fiskimálaráðnum um loyvi at flyta loyvini hjá Nornagesti og Kolumbussi yvir á Nónhamar og Fjalshamar.

- Vit halda okkum hava bíðað nóg leingi og vænta okkum svar hvønn einasta dag. Hinvegin munnu tey í Fiskimálaráðnum neyvan halda, at vit hava bíða leingi. Tað er so tað, leggur hann aftrat.

Tummas Christhophersen sigur, at Kristian Martin Rasmussen og synir vilja, at tey fýra skipini verða partur av ráfiskagrundarlagnum undir Kósavirkinum.

- Tað er eisini í hesum sambandi, at skipini verða keypt treytað av, at loyvini hjá Nornagesti og Kolumbussi kunnu flytast yvir á Fjalshamar og Nónhamar, sigur hann.